Javnaðarbussurin – Leið 2002 Tinganes

TÍÐNDASKRIV
Javnaðarflokkurin

Javnaðarflokkurin hevur í valstríðnum fingið sær ein buss til vega, sum skal koyra runt alt landið. Talan er um ein 20 persónar buss, sum flokkurin hevur leigað frá Strandfaraskipum. Bussurin er síðan skrýddur uttan við plakatum o.ø.

Bussurin, sum hevur fingið heitið Leið 2002 Tinganes er farin at koyra, og seinastu dagarnar hevur verið koyrt runt til bygdir í Norðoyggjum og Eysturoynni. Ætlanin er at bussurin skal vitja allar bygdir í Føroyum, har koyrandi er til, og sjálvan valdagin fer bussurin at koyra fólk til valstaðið í Havn.

Javnaðarflokkurin hevur í valstríðnum fingið sær ein buss til vega, sum skal koyra runt alt landið.

Koyriætlanin sær annars soleiðis út:

Norðoyggjar:	koyrir í dag afturat
Eysturoy:	hevur longu verið í Eysturoynni, og var sera væl móttikin
Norðstreymoy:	20. apríl koyrir bussurin á eystaru síðu í Norðstreymi og 21. apríl koyrir leið 2002 á vestaru síðu.
Vágar:	16. og 17. apríl verður bussurin í Vágum
Suðurstreymoy:	22., 23., 24. apríl og flaggdagin koyrir bussurin í Suðurstreymi
Suðuroy:	26., 27. og 28. apríl

»Renn fyri vívinum« á Oyrarbakka leygardagin

Leikurin »Renn fyri vívinum«, sum Spírar spæla, er nú spældur fyri 2700 fólkum kring landið.

Spírarnir hava umframt í Havn verið í Klaksvík og í Skopun, og allastaðni hevur verið útselt og fólk hevur latið ómetaliga væl at, siga tey í Spírum.

Komandi leygardag verður leikurin sýndur í Eydnuni á Oyrarbakka. Sýningar verða klokkan 17 og klokkan 20. Atgongumerki eru at fáa í Streymbúðini og við dyrnar, um nøkur atgongumerki eru eftir.

Aftaná Oyrarbakka eru ætlanir um at fara í Suðuroynna at spæla.

Leikararnir eru kunnugt: Aksel Joensen, Nikolaj Falk, Heðin Johannesen, Heini Poulsen, Ronni Poulsen, Kristina Ougaard, Beinta Clotier og Hallur Hjalgrímsson.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

Johan Joensen

andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. apríl, 63 ára gamal.

Jarðarferðin verður hósdagin 18. apríl kl. 13.00 úr Havnar kirkju.

Fyri tey avvarðandi
Nancy, Sólrun, Jan og Jón

Ull til heiður og æru

Føroyska ullin, sum á dag fyri stóran part verður koyrd burtur, skal gagnnýtast, sigur arbeiðsbólkur, sum landstýrismaðurin við vinnumálum hevur sett

LANDBÚNAÐUR
Edvard Joensen

Føroyska ullin skal ikki koyrast burtur, sum mangastaðni verður gjørt í dag. Hon skal savnast inn og gagnnýtast, stendur í tilmæli, landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur fingið frá arbeiðsbólki, sum hevur viðgjørt málið.

Arbeiðsbólkurin er samdur um at mæla landsstýrismanninum til at játta eina hálva millión krónur árliga í fimm á til eina verkætlani við eini ullarmóttøku.

Hendan móttøkan skal virka eina tveir-tríggjar mánaðar árliga. Ta tíðina, gingið verður á fjall um summarið, og meðan ullin verður savnað.

Føroysk ull er ikki bara ull sum so, tí seyðurin er óvuliga ymiskt littur. Tí má stórt arbeiða gerast fyri at skilja ullina. Ikki bara í góðskuflokkar, uttan eisini í litir.

Alt hetta arbeiði skal gerast á ullarmóttøkuni, og tann parturin av ullini, sum ikki kann nýtast, skal so fyribeinast.

Umframt skal ullarmóttøkan eisini átaka sær at turka og senda ullina víðari til virki ella aðrar keyparar.

Tað áliggur eisini seyðaánaranum at viðgera ullina og handfara hana soleiðis, at bara fyrsta floks vøra fæst burturúr. Hesum skulu teir stuðlast í, verður sagt í tíðindaskrivi, sum Vinnumálastýrið hevur sent út í samband við verkætlanina, farast skal undir.

Ullin, sum tikin verður, skal avroknast eftir dygd. Tí er sjálvsagt, at tann besta ullin, fær besta prísin.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at miðað verður eftir, at ullarmóttøkan skal rekast á handilsligum grundarlagi, men at ein minstiprísur tó verður ásettur.

Nevnt verður í viðmerking, at prísurin, sum í dag er galdandi, er fýra krónur fyri kilog, og verður tí gingið út frá, at hesin prísur verður settur sum minstiprísur frá ullarmóttøkuni.

Seinnu árini hevur føroysk ull ikki verið serligt í metum, sæst á teimum rúgvum, sum liggja víða hvar við rættirnar ymsastaðni í landinum.

Føroyingar hava heldur ikki gjørt nakað soleiðis fyri at fáa nakað burtur úr ullini. Hugsað hevur verið um kjøt. At fáa so nógva vekt sum gjørligt upp á krovið.

Ullin er so komin í aðru rað, ella als ikki hugsað um. Tað kemur til dømis týðuliga til sjóndar í litinum, føroyski seyðurin hevur. Her verður einki kynsbótararbeiði gjørt til tess at fáa einlittan seyð. Og tað sum verri er - ikki bara fyri ullina og ullarmóttøkuna, uttan mest fyri seyðin sjálvan - eru tær mongu pesjurnar, sum eru at siggja ymsastaðni.

Eitt er, at menn ikki tíma at taka ullina upp av rættini, tí tað ikki loysir seg. Men at heilar gongur ganga við pesju, tí ikki verður roytt á sumri, líkist ikki nøkrum. Haðani er so einki at vænta til nakra ullarmóttøku heldur enn skinnasølu á heysti.

Umframt at ein sovorðin pesja ikki kann brúkast til nakað sum helst, er tað ringt fyri seyðin at ganga soleiðis. Ullarmóttøkan skal stimbra seyðaánarum í at leggja seg meira eftir ullarrøkt
Mynd: Edvard Joensen

Heimavirkisblað komið

Várútgávan av limablaðnum hjá Føroya Heimavirkisfelag er komin. Blaðið verður givið út tvær ferðir árliga

ÚTGÁVA

Føroya Heimavirkisfelag hevur latið várútgávuna av limablaðnum úr hondum. Innihaldið er greinar um ymiskt heimavirki, eins og onkur ferðafrásøgn eisini er.

Limablaðið er prentað í A5 stødd og telur 28 blaðsíður. Umframt greinar og hugleiðingar, er eisini innan í permuni prentað skráin hjá Føroya Heimavirkisfelag fyri árið 2002.

Eitt mál, sum er til viðgerðar í felagnum, er skipan av øksifeløgum undir Føroya Heimavirkisfelag. Hetta verður viðgjørt í oddagrein eins og í greinum inni í blaðnum.

Annars eru frásagnir frá ymsum tiltøkum, sum hava við heimavirki at gera, umframt ein grein um føroyskan bát.

Føroya Heimavirkisfelag boðar eisini í blaðnum frá eini sonevndari Vættrakapping, har kappingin er um at gera eina føroyska vættur, sum seljast kann sum »souvenir«. Kappingin stendur við til hálvan juli.

ej

Er tað tær vit leita eftir?

Vinnumálastýrið sóknast eftir einum fólki til journalleiðarastarvið í stýrinum. Starvið verður sett undir Aðalskrivstovuni. Umframt aðalskrivstovuna fevnir Vinnumálastýrið um 3 deildir fyri ávikavist vinnu-, samskiftis- og veterinermál, og hevur stýrið sum høvuðsuppgávu at standa fyri at umsita vinnu-, samskiftis- og veterinermál hjá landsstýrinum. Vinnumálastýrið umsitur málsøki í m.a. ídnaði, handli, landbúnaði, aling, mati og umhvørvi, arbeiðsmarknaði, samskifti, samferðslu, herímillum fyrireiking og eftirlit við lógum, kunngerðum og reglugerðum.

Tín førleiki:
- skrivstovuútbúgving ella líknandi
- dugir væl føroyskt og danskt umframt kunnleika til enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastigi
- góð samstarvsevni

Tínar uppgávur:
- at journalisera og avgreiða post
- ymiskar skrivarauppgávur fyri fulltrúar, deildarstjórar og aðalstjóra
- aðrar skrivstovuuppgávur

Vit bjóða tær:
- eitt spennandi og læruríkt starv, sum tú sjálv/ur ert uppi í at skapa, viðhvørt strævið, men samstundis sera áhugavert og avbjóðandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

Løn- og setanartreytir
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir
Hevur hetta tín áhuga, er tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum, viðmælum o.ø. til:

Vinnumálastýrið
Postboks 377
Tórshavn

innan 1. mai 2002.

Upplýsingar um starvið fært tú frá Ara Johanneson, deildarstjóra í Vinnumálastýrinum, á tel 35 60 60.

VINNUMÁLASTÝRIÐ